

LÆKNAVAKT

*Gongst sum ætlað verður Suðuroy knýt upp í landsumfatandi læknavaktina tann 1. Oktober. Fáa suðuroyingar brúk fyri lækna eftir vanliga viðtalitíð, skulu teir sostatt ringja 1870 og so verður tað læknavaktin á Landssjúkrahúsinum, sum tekur støðu til víðari viðgerð*

# Skjótt skulu suðuroyingar ringja til 1870

**KOMMUNULÆKNASKIPAN** Um tríggjar vikur skulu eisini suðuroyingar ringja til Havnar, tá ið teir fáa brúk fyri kommunulækna uttan fyri viðtalitíð

Áki Bertholdsen

Gongst sum ætlað, verður kommunulæknaskipanin í Suðuroy umløgd tann 1. oktober.

Tað sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum. Tá er ætlanin, at Suðuroy skal knýtast upp í kommunulæknatænastuna, sum eisini umfatar restina av landinum, uttan Sandoy, Skúvoy og Dímum, sambært heimasíðuna hjá Heilsumálaráðnum.

Tað merkir, at fáa suðuroyingar brúk fyri læknahjálp uttanfyri vanliga viðtalitíð, skulu eisini teir ringja til 1870.

Tað verður so kommunulæknavaktin á Landssjúkrahúsinum, sum svarar telefonini og avgreiðir sjúklingin.

So stendur tað til læknavaktina at gera av, um sjúklingurin kann avgreiðast umvegis telefonina.

Kann hann ikki tað, verður sjúklingurin vístur til Suðuroyar Sjúkrahús, har ein læknavakt við yngri læknum tekur ímóti sjúklinginum.

Men ber ikki til at fáa sjúklingin á sjúkrahúsið, verður ringt eftir einum kommunulækna, sum hevur bakvakt og sum verður klárur at rykkja út.

## Bjarga Suðuroy

Hetta er ein skipan, sum semja varð fyrr í ár um at seta í verk fyri at bjarga kommunulæknaskipanini í Suðuroynni.

Sum støðan er nú, hava teir so nógvar vaktir, uttan fyri vanliga viðtalitíð, at tað minkar alvorliga um hugin at søkja starvið sum kommunulækni í Suðuroy, tí ongin vil vera kommunulækni undir slíkum umstøðum.

Nýggja skipanin fer at føra við sær, at kommunulæknin, sum hevur vakt fer at verða munandi minni órógvaður aftaná vanliga viðtalutíð, enn hann verður nú.

*aki@sosialurin.fo*

## Tveir yngri læknar í Suðuroy

Nú er ein vakt av yngri læknum skipað á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Tað er gjørt eftir avtaluni, sum varð gjørd ímillum sjúkrahúsið, kommunulæknarnar og Heilsumálaráðið fyrr í ár.

Sum tað sæst í aðrari grein her á síðuni, var avtalan gjørd fyri at bjarga kommunulæknaskipanini í oynni.

Tað eru vikarar, sum eru settir fyribils, Arnold Olavson Jensen og Rógvi Rasmussen.

Ein av uppgávunum hjá teimum verður at uttanfyri vanliga viðtalitíð, skulu teir vera virka forvakt í nýggju kommunulæknaskipanini, sum verður skipað í Suðuroy í næstu framtíð

Teir sjúklingar, sum læknavaktin á telefonnummarið 1870, ikki kann avgreiða umvegis telefon, verða vístir til hesa forvaktina. Hetta fer at avlasta kommunulæknarnar munandi, tí nú fáa teir bara sjúklingar at taka sær av, sum læknavaktin ikki kann avgreiða umvegis telefonina og sum heldur ikki eru førir fyri at fara á Suðuroyar Sjúkrahús til forvaktina av yngri læknum.

# Løgtingið kunnast um landsdystir

Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, vil nú hava at vita hvussu tað ber til, at sjónvarpið hjá Kringvarpinum ikki sendi landsdystirnar í fótbólti, sum Føroyar spældu ímóti Italia og Estlandi.

Í hesum sambandi hevur hann reist málið á Løgtingið, at hann beinleiðis spyr Helenu Dam á Neystabø nakrar ítøkiligar spurningar um kringvarpingina av føroyska landsliðnum.

Bill Justinussen vil hava av vita frá landsstýriskvinnuni, hvussu nógv hevði tað kostað Kringvarpinum at sent landsdystin móti Italia og dystin ímóti Estlandi beinleiðis í sjónvarpinum.

Men Bill Justinussen vil eisini hava at vita, hvussu nógv, fimm teir seinastu útidystirnir hjá landsliðnum, sum sjónvarpið vísti beinleiðis, kostaðu at senda.

Og at enda vil hann hava at vita frá landsstýriskvinnuni, hvussu samráðingarnar um prísirnar fram og, hvør stendur fyri hesum samráðingum fyri føroyska Kringvarpið.